CHECK-IN

Vága

2 Vælkomin í nýggju floghavnina

4 Sum stjórin sær tað

6 Framtíðin hjá føroyskari ferðavinnu

8 Framtíðin hjá Føroyum

10 Kuffertið frá hondini til flogfarið

12 Ein dreymaverð av tollfríum vørum
- áðrenn og aftaná

14 Sum arkitekturin sær tað

16 Destinasjónir beinleiðis úr Føroyum

17 Sørvágur
- heimið hjá flogvøllinum

18 Grønt ella reytt í tollinum - ella hundar

19 Farmur á veg upp

20 ILS - trygdin á flogvøllinum

22 Søgan hjá FAE
- úr herinum í sivil

Vága Floghavn
- portrið til umheimin

Nýggja farstøðin, sum varð tikin í nýtslu 18. juni, er síðsta stig í eini tilgongd, eini sólskinssøgu, sum byrjaði fyri góðum sjey árum síðani, tá Føroyar yvirtóku flogvøllin 1. januar 2007.

Tá vit yvirtóku flogvøllin, settu vit donsku myndugleikunum sum treyt, at peningur skuldi fylgja við til at nútímansgera flogvøllin. Tað endaði við, at landsstýrið fekk 365 mió. kr. til endamálið.

Havandi í huga, at flogferðslan er ein lívæðr og treyt fyri vøkstri og menning í Føroyum frameftir, varð peningurin í fyrstu syftu brúktur til at leingja flogvøllin.

Í 2011 varð hendan verkætlanin liðug, og vit hava í dag ein flogvøll á knappar 1800 metrar, sum lýkur allar treytir fyri nútíðar flogferðslu og flutningi, og sum kann taka ímóti størri flogførum. Longdi flogvøllurin hevur eisini við sær, at regulariteturin verður betri, at flogvíddin kann økjast, at trygdin verður betri, og at grundarlagið fyri kapping innan flogferðslu verður betri.

Alt hetta kemur føroyinginum til góðar, og endamálið er heilt greitt, at nýggju og betraðu fortreytirnar skulu hava við sær bíligari og betri flogferðir. Hesum endamáli stuðlar nýggja strategiin hjá Atlantic Airways eisini undir.

Nýggja farstøðin, sum varð næsta stig í útbyggingarætlanini, og sum nú er tikin í nýtslu, er bæði nýmótans og framtíðartryggjað við munandi betri hentleikum og kørmum, sum gera tað møguligt at taka ímóti nógv fleiri ferðafólkum. Farstøðin skapar harafturat munandi betri inntøkumøguleikar fyri Vága Floghavn, sum eg vóni og vænti eisini fara at koma føroyska ferðamanninum til góðar.

Vit kunnu í dag staðfesta, at stórt sæð allar neyðugu fortreytirnar fyri menning

innan føroyska flog- og ferðavinnu eru fingnar til vega, soleiðis at ferðavinnan kann gerast ein meiri týðandi súla undir føroyska samfelagsbúskapinum. Við nýggju farstøðini geva vit teimum útlendsku ferðandi eina góða mynd av okkara landi, so skjótt tey eru lend og móttikin í hesum nýggju og stásiligu kørmum. Og sum tey siga, “first impressions last”.

Jóhan Dahl, vinnumálaráðharri

Útgivið av Vága Floghavn í samstarvi við Traveltrademedia.com • Tekstur: Emil Lisberg Jacobsen / Howard Jarvis • Myndir: Kjartan Madsen, Jacob Eskildsen, Per Morten Abrahamsen, Hanus Jacobsen

KEYP NÚ!

Til Danmarkar ella heim – í góðari tíð

799,-

*) **Hvønn vegin** íroknað øll avgjøld

Vit hækka talið á allarbíligastu plássunum til **20** á flestøllum flogferðum á Danmarkar-rutunum.

Sum eina byrjan til okkara nýggju ætlan, bjóða vit tær nú 799-ferðaseðilin á øllum okkara Danmarkar-rutum. Er tú í góðari tíð, kanst tú longu nú keypa eina beinleiðis ferð til Keypmannahavnar, Billund, Aalborg ella heim fyri bara 799 kr. hvønn vegin - íroknað øll avgjøld

FINN 799 Í NÝGGJA LÁGPRÍSKALENDARANUM

Tað skal vera lætt at finna okkara mongu nýggju ferðaseðlar. Tí hava vit gjørt **LÁGPRÍSKALENDARAN** á atlantic.fo, har tú skjótt og lætt finnur og kanst keypa okkara bíligastu ferðaseðlar á okkara beinleiðis rutum til Danmarkar.
799-ferðaseðilin skal keypast í minsta lagi 60 dagar undan fráferð - so ver í góðari tíð. Hinvegin er útboðið stórt, og til ber at keypa **eitt heilt ár fram.**

Oddbjørg
Sølu- og tænastufólk

Keyp tína bíligu ferð á **atlantic.fo.**

Tú kanst eisini keypa ferðaseðilin frá ferðaskrivstovunum móti møguligum avgreiðslugjaldi.

1XPETUR

*) TREYTIR FYRI 799-FERÐASEÐILIN
799-ferðaseðilin er galdandi á beinleiðis rutunum millum Føroyar og Danmark. Skal keypast í minsta lagi 60 dagar undan fráferð. Kann ikki broytast ella endurgjaldast. Prísurin er galdandi hvønn vegin, tá tú keypir á atlantic.fo. Við persónligari avgreiðslu um telefonina, við telduposti o.ø., verður eitt avgreiðslugjald á 165 kr. lagt oman á prísin.

ATLANTIC AIRWAYS

VÓNIN ER FLEIRI
beinleiðis rutur

Nú floghavnin er liðugt útbygd, ber til hjá Vága Floghavn at hyggja frameftir. Stjórin Jákup Sverri Kass sigur, at útbyggingin letur upp fyri nógvum nýggjum møguleikum, og vónin er, at floghavnin fer at hava fleiri beinleiðis rutur út í heim. Hann væntar, at um tíggju ár eru tvey flogfeløg, sum hava fasta rutuflúgving til og úr Føroyum.

Hjá partafelagnum Vága Floghavn snýr tað seg um at hava ein sunnan fíggjarligan rakstur. Og við nýggju og útbygdu floghavnini eru fortreytirnar fyri hesum munandi bøttar.

- Samanumtikið gevur hetta okkum betri umstøður til at dríva eina forrætning, sigur Jákup Sverri Kass, stjóri í Vága Floghavn.

- Útbyggingin er liðug, og nú kunnu vit fara út at selja, sigur hann.

- Í fyrstu atløgu vóna vit at fáa fleiri óbeinleiðis inntøkur, eitt nú við tollfríari sølu í nýggja handlinum og útleigan av bygningum

og plássi til eitt nú parkering. Samanumtikið fáa vit fleiri inntøkumøguleikar, og tað fer eisini at koma viðskiftafólkunum til góðar, eitt nú við møguleika fyri størri avsláttri á ferðaavgjøld, sigur Jákup Sverri Kass.

Tvey flogfeløg um tíggju ár

Í løtuni er Atlantic Airways einasta flogfelag, sum brúkar Vága Floghavn til regluliga rutuflúgving. Atlantsflog flýgur til okkara grannalond og hevur seinastu árini havt onkrar beinleiðis rutur til suðurevropa, men størsta vónin hjá Jákup Sverra Kass er, at floghavnin kann fáa fleiri beinleiðis rutur út í heim. Og hann roknar við, at tað verður veruleiki.

- Størsta visjónin fyri framtíðina er, at vit hava fleiri beinleiðis rutur. Útlendsk feløg hava fyrr víst ítøkiligan áhuga fyri at brúka Vága Floghavn til fasta rutuflúgving, og eg síggi fyri mær, at í seinasta lagi um tíggju ár hava vit tvey ymisk flogfeløg – eitt føroyskt og eitt útlendskt – sum hava fasta flúgving til og úr Føroyum, sigur Jákup Sverri Kass.

Koma væl avstað

Flogvallarstjórin hevur eina góða kenslu, nú nýggja floghavnin er liðug.

- Ferðin út í heim byrjar, tá tú fert heimanifrá, og við nýggju farstøðini kunnu vit nú syrgja fyri, at fólk koma væl avstað og fáa eina góða byrjan upp á sína ferð, sigur hann.

- Tað er eingin loyna, at tað til tíðir hevur verið trongligt, og at umstøðurnar hjá ferðafólkunum hava verið hareftir, men í nýggju floghavnini verður rúmligari, og tað ber til hjá ferðafólki at vera her í fleiri tímar, uttan at tað skal kennast strævið. Stutt sagt fara tey at trívast betur í floghavnini, sigur Jákup Sverri Kass. Gamla farstøðin varð bygd til at avgreiða 100.000 fólk um árið, men við nýggju farstøðini verður hetta ferfaldað til 400.000 fólk um árið.

Í 2013 ferðaðust 236.564 ferðafólk um Vága Floghavn, og tað eru fleiri ár liðin, síðani farstøðin bleiv ov lítil.

- Eg haldi, at síðani oljuflúgvingin byrjaði fyri eini 15 árum síðani, hevur tað verið neyðugt við eini útbygging. Áðrenn tað var tað rættiliga lætt at kenna ferðamynstrið hjá teimum, sum brúktu floghavnina, men seinnu árini hevur tað verið átrokandi at fáa farstøðina útbygda, sigur Jákup Sverri Kass.

Stórur vøkstur *er í luftini*

Guðrið Højgaard, stjóri á Visit Faroe Islands, er fegin um, at einasta floghavn í landinum nú hevur eina nýggja og stásiliga farstøð.
- Í dag kemur í mesta lagi ein triðingur av ferðafólkunum til Føroya við flogfari, men tað er í flogferðsluni, at størstu møguleikarnir fyri menning eru, sigur hon.

- Hetta er eitt flott arbeiði, sum er gingið bæði skjótt og væl. Og hetta ger tað lættari hjá okkum at hava samband við umheimin.

Tað sigur Guðrið Højgaard, stjóri í Visit Faroe Islands, nú nýggja farstøðin hjá Vága Floghavn er tikin í nýtslu.

- Tað er gleðiligt, at vit hava fingið eina nýggja farstøð, tí hetta er tað fyrsta og tað síðsta, sum fólk síggja, tá tey ferðast millum Føroyar og onnur lond, sigur hon og leggur afturat, at hetta er eitt bonus fyri ferðavinnuna.

Longri flogvøllur størri týdning

Hjá ferðavinnuni er tað sjálvandi umráðandi at hava so góðar umstøður sum til ber, tá tað ræður um at fáa fólk til landið og úr landinum aftur. Men hóast Guðrið Højgaard fegnast um nýggju farstøðina, so heldur hon ikki, at tað fer at síggjast beinleiðis aftur í talinum av ferðafólkum, at umstøðurnar í floghavnini eru bøttar.

- Nei, tað vænti eg ikki. Hetta skal ikki misskiljast. Eg eri fegin um, at vit hava fingið eina nýggja farstøð, og tað fer eisini at geva okkara viðskiftafólkum eina betri tænastu, men eg haldi ikki, at tað verður terminalurin, sum fer at draga fleiri útlendsk ferðafólk hendan vegin, sigur hon.

- Fyri ferðavinnuna hevur tað havt størri týdning at fáa ein longri flogvøll, tí tað hevur givið okkum møguleikan at fáa størri flogfør og harvið fleiri fólk hendan vegin, sigur hon.

Flogvøllurin varð longdur úr 1250 metrum upp í 1799 metrar og stóð liðugur seint í 2011. Síðani tá er talið av ferðafólkum í Vága Floghavn støðugt vaksið – úr góðum 200.000 í 2010 til 225.000 í 2012 og 236.000 í 2013.

Hesi árini hevur Atlantic Airways eisini broytt flotan hjá sær, so hann nú hevur trý Airbus-flogfør, ið kunnu taka fleiri ferðafólk enn tey gomlu British Aerospace-flogførini, ið so líðandi eru farin úr flotanum.

Flogferðsla er framtíðin

Í dag koma tvey av hvørjum trimum ferðafólkum til landið við skipi, antin við Norrønu ella við øðrum ferðamannaskipum. Men tey mongu lágprísflogfeløgini, sum hava tikið seg upp, hava ført til ein stóran vøkstur í flogferðsluni á altjóða marknaðinum, tí tað gevur vanligum fólki betri møguleikar at ferðast loftvegis. Guðrið Højgaard sigur eisini, at størstu møguleikarnir í ferðavinnuni framyvir eru í just flogferðsluni.

- Vanliga hugsanin í øðrum londum er eisini, at tað er í flogferðsluni, at størstu møguleikarnir fyri menning eru. Tú kemur skjótari fram við flogfari, og nú tað er vorðið bíligari at ferðast við flogfari, eru alsamt fleiri fólk farin at býta sína frítíð upp í fleiri partar og taka sonevndar long weekends, tí tað nú ber til at koma aftur og fram upp á bert fáar tímar og fyri ein rímiligan prís, sigur Guðrið Højgaard, stjóri í Visit Faroe Islands.

Floghavnin tryggjar eina *fjølbroytta kommunu*

Vága Floghavn hevur risastóran týdning fyri Sørvágs Kommunu. Sambært borgarstjóranum Suna Jacobsen skapar floghavnin ikki bara arbeiðspláss, men eisini fjølbroytni og trivnað í kommununi

- Atlantic Airways og Vága Floghavn tilsamans geva meir enn 200 fulltíðarstørv, og tað eru umleið 1100 borgarar í kommununi. Við øðrum orðum gevur hetta arbeiðspláss til góð 20 prosent av borgarunum.

Tað staðfestir Sune Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs Kommunu, tá hann verður spurdur um týdningin, sum Vága Floghavn hevur fyri kommununa. Og talan er eisini um eitt fjølbroytt arbeiðspláss, sum so aftur skapar størri fjølbroytni í kommununi.

- Tað eru arbeiðspláss av ymsum slag: flogskiparar, mekanikarar, teldufólk og annað. Harumframt skapar floghavnin eisini tað, vit kalla avleitt virksemi. Samanumtikið gevur tað eitt stórt útboð fyri eina so lutfalsliga lítla bygd sum Sørvág, sigur Sune Jacobsen.

Gevur tryggleika

Umframt at tryggja nógv arbeiðspláss gevur Vága Floghavn eisini kommununi ein ávísan tryggleika, ikki minst nú hon er útbygd.

- Tað hevur jú javnan verið upp á tal at flyta flogvøllin ella gera ein annan flogvøll aðrastaðni í landinum. Men nú flogvøllurin og farstøðin eru liðugt útbygd, kenna vit á okkum, at vit varðveita floghavnina, sigur Sune Jacobsen.

Hann fegnast eisini um, at bæði løgreglan og Posta nú hava fingið sær høvuðssæti í Vága Floghavn. Borgarstjórin væntar, at serliga posthúsið fer at gera floghavnina meira livandi, tí nú verða tað ikki bara fólk, sum skulu út at ferðast, ella sum just eru lend, sum fara at brúka floghavnina.

Eitt nýtt tíðarskeið er byrjað

Nú arbeiðið við at nútímansgera flogvøllin og Vága Floghavn er liðugt, byrjar eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari samferðslusøgu. Johan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, fegnast um broytingarnar, sum eru gjørdar á hesum økinum seinastu árini.

Tá Føroya landsstýri í 2007 yvirtók Vága Floghavn frá Statens Luftfartsvæsen, var tað samstundis við einum ynski um at útbyggja og nútímansgera einastu floghavnina í landinum. Og nú sjey ár seinni er ynskið vorðið veruleiki.

- Tað er eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari samferðslusøgu, sum byrjar nú. Vit kunnu nú nøkta tann tørvin, sum hevur verið á einum góðum flogvølli og umstøðunum rundan um vøllin, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður við vinnumálum, sum eisini umsitur loftferðslu og samferðslu.

- Hesi seinastu árini hava vit havt eina góða og spennandi tilgongd á hesum økinum. Vit hava fingið eina nýggja ferðavinnustrategi við Visit Faroe Islands, Atlantic Airways hevur lagt sína nýggju strategi fram, og vit hava fingið ein longri flogvøll, sum kann taka ímóti størri flogførum, og ein nýggjan terminal, sum kann taka ímóti fleiri fólki, sigur Johan Dahl.

- Við hesum eru karmarnir hjá ferðavinnu, fólkaflutningi og farmaflutningi vorðnir betri, og tað gevur grundarlag fyri vøkstri og menning innan bæði ferðavinnu og útflutning.

Byrjaði við yvirtøkuni

Landsstýrismaðurin sigur, at gongdin við at koma hartil, sum vit eru í dag, byrjaði við yvirtøkuni av flogvøllinum í 2007.

- Tá vit yvirtóku Vága Floghavn, var tað við einum ynski til donsku myndugleikarnar um, at har fylgdu pengar við til at nútímansgera flogvøllin. Vit fingu so 365 milliónir krónur til endamálið, og fyrsta stigið var so at leingja sjálvan flogvøllin, greiðir Johan Dahl frá.

Seinnu helvt av 00-unum gekk búskaparliga aftur á hond bæði í USA og Evropa. Men fyri útbyggingina av Vága Floghavn vísti umfatandi búskaparkreppan seg at vera ein fyrimunur.

- Tað ljóðar eitt sindur løgið, men fyri útbyggingina av Vága Floghavn kom lágkonjunktururin í roynd og veru væl við, tí tilboðini upp á at leingja flogvøllin vóru ikki so kostnaðarmikil. Og tá flogvøllurin so var liðugur, vóru framvegis pengar eftir til at gera eina nýggja og góða farstøð fyri.

Heilt nýggjar møguleikar

Tað er hendan farstøðin, sum nú er liðug og tikin í nýtslu, og sostatt er útbyggingin av Vága Floghavn av á hesum sinni.

- Tað frøir meg eisini, at tað eru føroyskar fyritøkur og føroyskir arkitektar, sum hava staðið fyri hesi byggingini, ið gevur okkum heilt nýggjar møguleikar, sigur Johan Dahl.

- Tað hevur so ómetaliga nógv at siga, at loftvegis sambandið til útheimin er nøktandi. Í so máta er Vága Floghavn hjartað í samfelagnum, og eg vóni, at við hesum verður netverkið hjá Føroyum út í heim so gott sum til ber, sigur hann.

- Tað er eisini mín vón, at hetta fer at gera sítt til, at vit fara at fáa fólk til Føroya. Ikki bert útlendsk ferðafólk, men eisini føroyingar. Tað skal kunna bera til at ferðast aftur og fram fyri ein sámiligan prís, ikki minst hjá teimum, sum arbeiða uttanlands, sigur Johan Dahl.

NÝGGJAR PORTURSDYR
til útheimin

FAEROPORT
BYGGILIST OG VERKFRØÐI

SNA
SELMAR NIELSEN ARKITEKTUR SP/F

ÁRNI ARKITEKTAR WINTHER

LBF

SMJ

Viðføri í góðum hondum

Á nýggju farstøðini í Vága Floghavn er viðførið í góðum hondum. Tú kanst innrita teg sjálvan við nýggju check-in skipanini, ella tú kanst gera sum fyrr og lata starvsfólkini innrita teg og títt viðføri.

Við innritan verður viðførið vigað. Tað er ymiskt, hvussu nógv viðførið kann viga uttan eyka kostnað. Hjá Atlantic Airways til dømis kann viðførið, alt eftir hvat slag av ferðaseðli tú hevur, viga millum 20 og 30 kilo, uttan at eyka kostnaður verður lagdur á. Viðføri tyngri enn 32 kilo vigar ov nógv og má býtast upp í tveir smærri partar.

Eftir innritan verður viðførið ført á spildurnýggjum flutningsbandi aftur um innritingardiskin, har trygdareftirlitið kannar, um alt er í lagi við viðførinum. Kuffertið fer gjøgnum skannaran og verður síðani lagt á vognin, sum skal føra tað út í sjálvt flogfarið. Her hevur Vága Floghavn fingið eina nýggja viðførislyftu, sum er serstakliga hent til serliga tungt viðføri.

Tá vognurin er fullur, verður koyrt út til flogfarið.

Customs Regulations
for travellers to the Faroe Islands

Alcoholic beverages

+

+

Spirits 1 ltr. Fortified wine 1 ltr. Beer or cider 2 ltr.

or

+

+

Spirits 1 ltr. Table wine 2 ltr. Beer or cider 2 ltr.

or

+

Table wine 4 ltr. Beer or cider 2 ltr.

Tobacco

Cigarettes 100 pcs.

or

Cigarillos 100 pcs.

or

Cigars 50 pcs.

or

Tobacco 250 grams

Eau de toilette, perfume, chocolate, soda



Perfume 50 g

Eau de toilette 25 cl

Chocolate products 3 kg

Soda 10 litres

Other goods

You may import other types of goods without paying duty and tax for a total value of DKK. 2.500,-.

If the total value exceeds DKK. 2.500,- duty and tax must be payed of the total value.

Goods consisting of multiple parts, form a whole, operate together or are normally sold together, where the total value exceeds DKK 2.500,- are liable to duty and tax. They can not be imported in parts, e.g. multiple times or by multiple persons despite the value of each part being less than DKK 2.500,-.

Travellers to the Faroe Islands can import these goods duty and taxfree, provided that the traveller is 18 years old.

TAKS
CUSTOMS

Okkurt fyri øll *til* tollfrían prís

Nýggi tollfríi handilin í Vága Floghavn leggur seg eftir at hava eitt breitt úrval við bæði bíligum og dýrum vørum. Her er okkurt fyri øll.

Við nýggja tollfría handlinum í Vága Floghavn hava ferðafólk nú eitt nógv størri úrval av vørum at velja í. Har handilin í gomlu floghavnini var 60 fermetrar til støddar, er handilsøkið í nýggju og umbygdu floghavnini heili 450 fermetrar.

- Vit eru ómetaliga væl nøgd. Tað er ein fantastisk kensla, at vit í Føroyum kunnu presentera nakað so flott sum hetta, sigur Jonny Müller Prisco.

Hon er leiðari í Duty Free FAE, sum nýggi handilin eitur. Handilin hevur allar tær vørur, sum vanliga fáast til keyps í eini floghavn, og sambært leiðaranum verður nakað fyri øll.

- Vøruúrvalið er stórt og breitt. Eitt nú hava vit eitt stórt úrval av whisky. Tað hevur verið ein ávísur eftirspurningur eftir einum breiðari úrvali av whisky, og nú hava vit nógv fleiri sløg enn áður, bæði í bíligara og dýrara endanum, sigur Jonny Müller Prisco.

- Vit hava eisini lagt okkum eftir at hava eitt stórt úrval av luktilsum, kremum og øðrum kosmetikki, eins og úrvalið av góðgæti er væl størri enn áður, sigur hon.

Millum merkini, sum eru at fáa í nýggja handlinum, kunnu nevnast Gucci, Ray-Ban, Prada, Armani, Skagen og Sif Jakob.

Umframt nógv av teimum kendu útlendsku merkjunum hevur Duty Free FAE sum vera man eisini føroyskar vørur, eitt nú frá Navia.

Vilja vera bíligari

- Vit hava eitt nú hugt eftir, hvat føroyingar keypa, tá teir eru í floghavnini í Kastrup, og vit leggja okkum eftir at vera

bíligari enn Kastrup, so fólk keypa her heldur enn í Danmark, sigur hon.

Partafelagið Duty Free FAE, sum Vága Floghavn og Atlantic Airways eiga hvør sín helming í, rekur nýggja tollfría handilin við sama navni.

Við avloysarum og hálvtíðarsettum hevur nýggi handilin tilsamans 17 fólk í starvi.

Týska handilsketan við tollfríum vørum, Gabr. Heinemann, hevur hjálpt til við at innrætta handilin og hevur eisini ráðgivið um, hvussu vøruúrvalið skal vera.

Minnast bretska *upprunan*

Sniðið á nýggju farstøðini hjá Vága Floghavn minnir okkum á, at tað upprunaliga vóru bretar, sum gjørdu flogvøllin undir krígnum.

At byrja við vóru 15 ymsar fyritøkur, bæði føroyskar og útlendskar, sum sendu uppskot inn um nýggju farstøðina í Vága Floghavn. Í desember 2010 valdi nevndin í Vága Floghavn fýra av hesum innsendu uppskotunum burturúr. Síðani varð mett um byggilistarligu dygdirnar, kostnaðin og ætlaðu skipanina av arbeiðnum.

Og í juni 2011 varð uppskotið hjá FAERPORT so valt út sum tað besta. Hetta uppskotið fevndi um eina stóra bogaða konstruksjón, ið skal vekja minnir um upprunan hjá flogvøllinum, sum bretar gjørdu undir krígnum.

- Vit hava í uppskotinum havt í huga, at bretar bygdu flogvøllin. Teir settu nógvar barakkir eftir sær, ið høvdu somu bogaðu konstruksjón, sum vit hava brúkt. Bogaði bygningurin vísir á bretska upprunan hjá flogvøllinum og líkist samstundis eini altjóða fráfaringarhøll, segði Árni Winther, ið var ein av arkitektunum handan uppskotið, tá Vága Floghavn og FAERPORT høvdu undirskrivað sáttmálan í juni 2011.

Árni Winther Arkitektar, Selmar Nielsen Arkitektar, LBF og Sofus M. Jakobsen við COWI og Boeing Energy mynda samtakið FAERPORT.

Opin og rúmlig

Nakað av tí týdningarmesta við eini floghavn er at fáa avgreitt ferðsluna skjótt og væl, bæði við fólki og flogførum, og tað er sum vera man eisini nakað, sum vigar tungt, tá ein nýggj farstøð skal teknast.

Arkitektarnir hava lagt dent á, at tað skal vera lætt hjá ferðafólkum at flyta seg frá stað til stað og at fáa eitt skjótt yvirlit yvir, hvagar tey skulu.

Harumframt hava arkitektarnir brúkt nógv glas, so floghavnin er ljós og kennist opin og rúmlig. Samstundis sæst væl úr floghavnini og út á sjálvan flogvøllin, og tað skal geva fólki eina kenslu av, at tey eru á ferð.

Lendið kring floghavnina er eyðkent føroyskt við fjøllum og haga, og stóra bogaða takið, sum eyðkennir nýggju farstøðina, virkar sum ein yvirgongd frá tí bygda geometriska yvir í tað óskipaða runda skapið av náttúruni rundanum.

Stóru glasvindeyguni út móti flogbreytini gera floghavnina rúmligari og geva gott útsýni til flogførini

Tekjan á nýggja terminalinum skal minna okkum á, at bretski herurin av fyrstan tíð gjørdi flogvøllin. Skapið á tekjuni er sum á eini hermannabarakk

Stórur dentur er lagdur á, at ferðafólkastreymurin gongur so væl sum gjørligt í nýggju floghavnini

Security *is safety*

Houlberg Instrumentering provides security equipment for all types of check points. You will find us in the Danish airports, maritime ports, at border crossings, in prisons, private companies, ministeries and at major events.

Our guarantee of a high level of security is your (and your clients) guarantee of security and good experiences. Therefore, we use only the best equipment on the market and we always comply with applicable laws and regulations.

It is not without reason that our cooperates goes many years back in time - and well into the future!

Flogleiðir úr *Føroyum*

Bergen
Portrið til norsku firðirnar. Hetta er býurin við føtrunum í sjónum, høvdinum í luftini og hjartanum á rætta stað.

Bergen er vorðin eitt ørgrynni av mentanum og er samstundis mest altjóða býur í Noregi. Bergen vaks upp rundan um litríka havnarlagið og var miðdepil fyri handli, sjóferðslu og handverki.

Gamla Bryggen er óbroytt seinastu fleiri hundrað árini og sær út sum hon gjørdi í 11. øld. Broytingartíðir hava givið bryggjuni frið, so hon í dag eigur pláss í World Heritage yvirlitinum hjá Unesco.

Aberdeen
Við einum bergtakandi blandingi av óspiltari náttúru, vakrari strond og einum livandi kosmopolitiskum býi hevur Aberdeen City og Shire alt frá bergtakandi borgum til ónortar strendur, frá Highland sjónleiki til forvitnisligan mat og drykkir og fantastiskt djóralív í nakað av stórslignastu náttúru í Skotlandi.

Við eini hugvekjandi samanrenning av brimbardari strond, mjørkaklæddum fjøllum og fruktagóðum skógi er náttúran í Aberdeenshire heimið hjá eini ørgrynnu av djórasløgum. Síggið sermerkta landslagið í Cairngorms National Park, sum er størsta náttúrulund í Stórabretlandi.

Reykjavík
Hóast sína lutfalsliga stuttu søgu sum býur hevur Reykjavík í dag eina rúgvu av spennandi ferðamálum og søguligum støðum. Frá stórslignum bygningsverkum sum Hallgrímskirkjan og Perlan til týðandi støð sum Höfði, har heimssøga varð skrivað. Ella sum eitt romantiskt ferðamál, har dentur verður lagdur á náttúruna og list.

Mallorca
Maturin, veðurlagið og frálík gistingarhús til familjur og pør – nógv er, sum talar fyri Mallorca.

Á hesi fullfíggjaðu frítíðaroynni kanst tú velja millum alt frá familjuundirhaldi til serstøk gistingarhús í fjallabygdunum og marglætiskend spastøð beint við strondina. Oyggin lokkar við krystallklárum vatni, vøkrum víkum og óspiltari náttúru, sum tú kanst ganga ella súkkla í.

Barcelona
Anda djúpt, tá onkur vísir tær runt í Barcelona. Merk angan av havinum, sum blandar seg við kryddurtirnar frá litríku marknaðunum. Et tapas, síggj framúrskarandi byggilistina hjá Gaudi, svim í Miðjarðarhavinum ella miss teg sjálvan burtur í gotiska býlinginum. Spáka ein túr eftir lívligu Ramblaini, fá útsýni og nútímans list á Montjüic, ella far ein túr á fótbóltsstadion. Kanska sært tú onkran av teimum kendu spælarunum har.

Keypmannahavn
Høvuðsstaður Danmarks, hagar tey flestu ferðast úr Føroyum. Higar koma tey flestu fyri antin at flúgva víðari út í víðu verð, ella koma tey í arbeiðsørindum ella at halda frí. Floghavnin í Keypmannahavn hevur teir flestu vegirnar víðari út í heim.

Billund
Billund er miðdepil í tí partinum av Danmark, har flest føroyingar búgva. Men nógv brúka eisini Billund sum útgangsstøði til ein familjutúr til eitt nú Legoland ella Lalandia. Nógvar frítíðarupplivingar eru at fáa á Jútlandi og á Fjóni. Harumframt kann Billund eisini brúkast sum millumstøð, tí fleiri stór flogfeløg sum KLM, British Airways, Air France, Finnair og SAS flúgva úr Billund.

Aalborg
Aalborg er í stórari menning – frá ídnaðarbýi til spennandi mentanar- og upplivingarbý. Her fært tú allar partar av býarlívi, savnaðir saman á einum lítlum øki. Ein góð blanding av víkingatíð, miðøld og okkara tíð við altjóða list og byggilist. Her er einasta listasavn hjá byggifrøðinginum Alvar Aalto, og nøkur av frægastu fornminnum í Norðurlondum eru Lindholm Høje, har vakurt útsýni er yvir býin, og Aalborg Forsvars- og Garnisonsmuseum við upplivingum til alla familjuna.

Flogrutan
Lætt og bíligt
Altíð pláss til viðføri

STRANDFARASKIP
LANDSINS

BETRI PLÁSS AT TOLLA

Fleiri kanningarrúm og tollfrí søla og viðførisband í hvør sínum rúmi lætta munandi um arbeiðið hjá tollvaldinum í Vága Floghavn

Hjá tolleftirlitinum í Vága Floghavn hevur tað stóran týdning at hava fingið nýggjar og rúmligari arbeiðsumstøður at virka undir.

Eitt stórt framstig er, at fleiri kanningarrúm eru gjørd. Fyrr brúkti tollvaldið rúm, sum ikki vórðu gjørd til endamálið, til at kanna fólk og viðføri, og at enda áðrenn útbyggingina hevði tollvaldið bert tað eina rúmið til at gera hetta.

Í dag eru trý kanningarrúm, og tí kann tollvaldið kanna fleiri fólk í senn, um tað er neyðugt.

Harumframt hevur tollvaldið fingið góð og rúmlig skrivstovu- og uppihaldshølir.

Vørur og viðføri hvør sær

Ein av størstu fyrimununum hjá tollvaldinum við nýggju farstøðini er, at tollfríi handilin og viðførisbandið ikki longur eru í sama rúmi. Tað merkir, at fólk fyrst keypa tað, tey skulu í tollfríu søluni, og fara so víðari og standa í frið og bíða eftir teirra viðføri. Ikki minst hjá hassjhundinum er hetta ein stórur fyrimunur.

- Plásstrot var okkara størsti trupulleiki áðrenn útbyggingina, sigur Fróði M. Davidsen, hundaførari, sum eisini fegnast um, at hundurin hevur fingið eitt rúm fyri seg sjálvan.

Einasta bakkastið við umbyggingini er, at tað ikki er so lætt hjá tollarunum at koma út til sjálva gateina. Har skulu teir gjøgnum trygdareftirlitið fyrst. Tað kann vera neyðugt hjá tollarum at vera heilt úti við gateina og taka ímóti ferðafólki, um illgruni er um, at viðkomandi hevur rúsevni við og ætlar at sleppa sær av við tey, áðrenn viðkomandi fer gjøgnum tollin.

Næsta stigið hjá tollvaldinum í Vága Floghavn verður at fáa ein røntgenskannara. Ein skannari verður brúktur til at gjøgnumlýsa eitt nú kuffert, og sambært Fróða M. Davidsen vindur tað upp á seg at goyma rúsevni og annað so væl í loyniligum rúmum í kuffertum, at tollvaldið sum nú er noyðist at bróta tey fyri at fáa hendur á tí. Ein skannari, sum kann finna slík goymistøð, er standardútgerð í flestu floghavnum.

Kunnu avgreiða tvær ferðir so nógvan farm

Við nýggju umstøðunum í Vága Floghavn verður farmaflutningur bæði lættari og skjótari at avgreiða

Farmaflutningurin um Vága Floghavn verður nógv lættari, nú nýggja floghavnin er tikin í nýtslu. Við nýggju umstøðunum kann floghavnin avgreiða tvær ferðir so nógvan farm sum áðrenn.

Fyrr var tað soleiðis, at allur farmur varð avgreiddur innan fyri hegnið, og tað gjørdi tað langdrigið við trygd og øðrum. Nú verður tað nógv høgligari og brúkaravinaligari hjá flutningsfyritøkum at fáa teirra vørur. Posta, sum stendur fyri meginpartinum av farmaflutninginum til og úr Vága Floghavn, fer nú at fáa síni egnu avgreiðsluhøli og egna goymsluhøll, og tað fer eisini at gera tað lættari hjá fólki at avheinta teirra pakkar og annað á flogvøllinum.

Gongur skjótari

Nýggju umstøðurnar til farmaflutning kunnu gera tað meira freistandi hjá flutningsfyritøkum at brúka Vága Floghavn til teirra farmaflutning.

Tað er lutfalsliga lítið av flogfrakt, sum fer um Vága Floghavn í dag. Tað mesta er farmur, sum fer av landinum, men tað kemur lítið utanífrá. Kappingin við sjóvegis flutning er eisini hørð.

Men nýggja strategiin hjá Atlantic Airways nevnir eisini størri farmaflutning, tí sum nú er, er plass fyri farmi á nærum hvørjum túri.

Ein av fyrimununum við loftvegis farmaflutningi er sjálvandi eisini, at bíðitíðin eftir at fáa vøruna ikki er so drúgv, og við nýggju umstøðunum í floghavnini verður tann bíðitíðin upp aftur styttri.



EIN TRYGGARI floghavn

Við seinastu útbyggingunum av Vága Floghavn hava føroyingar fingið eina floghavn og ein flogvøll, sum stendur øll mát langt fram í tíðina

Tað fylgja nógv trygdarkrøv við einum flogvølli og eini floghavn. Tí var tað eisini sjálvsagt, at saman við leingjanini av flogvøllinum og nýggja terminalinum gjørdust trygdarviðurskiftini betri.

- Sjálvi trygdarkrøvini hava alla tíðina verið har, men nú hava vit fingið betri umstøður til at útinna hesi krøvini, sigur Finnbogi Niclasen, varastjóri í Vága Floghavn.

Nýggi flogvøllurin stóð liðugur í 2011. Tá vórðu nýggj innflúgvingartól eisini sett upp, sum hava gjørt tað nógv lættari hjá flogførum at seta seg í Vágum.

Í mars 2012 kom fyrsta Airbus-flogfarið hjá Atlantic Airways til landið, og tá gjørdist Atlantsflog fyrsta flogfelag í Evropa at brúka framkomnu RNP-tólini til lending. Hetta eru tól, sum um fylgisvein finna bestu innflúgvingarleið til flogfarið.

Vága Floghavn hevur nú eina fullfíggjaða ILS-innflúgvingarskipan, so flogfør kunnu seta seg í mestsum øllum veðri. Fyri 35 árum síðani var kravda sýnið fyri at kunna lenda í Vágum heilt upp í átta kilometrar, men síðani 2011 hava flogfør við at brúka nýggju ILS-skipanina kunnað sett seg í sýni heilt niður í 1500 metrar.

Eftir miðjuni á flogbreytini eru ljós løgd niður í sjálvan vøllin, sum gera tað nógv lættari hjá flogskiparum at lenda, og í hvør sínum enda á flogvøllinum eru átta blunkljós sett upp, umframt at tvey stór ljós eisini eru sett út í Vatnið.

Halda langt fram í tíðina

Í nýggju farstøðini hevur trygdin eisini fingið betri karmar. Rúmið, har ferðandi fara gjøgnum trygdareftirlitið, er nógv størri, og tað sama er bandið, har alt viðførið skal gjøgnum skannaran. Ferðafólkastreymurin gongur skjótari, og tollvaldið hevur fingið betri umstøður til at kanna viðføri og ferðafólk.

Finnbogi Niclasen sigur, at Vága Floghavn nú hevur trygdarumstøður, sum kunnu halda langt fram í tíðina, og at tað frá nú av mest verður talan um dagføringar.

ØVERAASEN
SNOWREMOVAL SYSTEMS

Fyrsta rutuflogfar millum Føroyar og útheimin fleyg í 1946. Tað var eitt skotskt DC-3 flogfar, sum skuldi flúgva millum Vágar og Keypmannahavn um Prestwick í Skotlandi. Men flúgvingin steðgaði aftur longu sama árið
Mynd: P/F N. Niclasen/Vága Samferðslusøga

Bretar bygdu flogvøllin

Bretska loftverjan RAF gjørdi av, at Vágar var best egnað stað at gera flogvøll í Føroyum. Hann stóð liðugur í 1943, men eftir krígslok lá hann í órøkt fram til 1963.

Tað var 12. apríl í 1940, at bretski forsætismálaráðharrin Winston Churchill í røðu í Undirhúsinum boðaði frá, at Bretland fór at herseta Føroyar og fór at gera eina flogstøð í Føroyum.

Longu sama ár og árið eftir flugu fleiri bretsk flogfør runt oyggjarnar at kanna, hvar besta staðið at gera ein flogvøll var. Og 2. mars 1942 tóku bretar so avgerð um, at flogvøllurin skuldi gerast við Sørvág. Ein stórur fyrimunur við hesum var eisini, at tað bar til hjá flogførum at seta seg á vatninum skamt frá vøllinum.

Upprunaliga var ætlanin at gera tríggjar flogbreytir á staðnum, men arbeiðið bleiv drúgvari enn roknað varð við, og tí varð bert tann eina flogbreytin gjørd, sum stóð liðug á heysti 1943.

Tá var gongdin í krígnum um at venda, og tá bretska flogvápnið RAF fór úr Vágum 1. september 1944, høvdu bara tíggju flogfør sett seg á flogvøllinum og eini 65 høvdu lent á vatninum.

Í desember 1944 fingu Føroyar flogvøllin, í gávu frá bretsku myndugleikunum. Talan var tá um eina 1096 metra langa flogbreyt við ljósum, sum var 180 metrar breið í vestara enda og 92 metrar breið í hinum endanum.

Flogvøllurin miðskeiðis í 1960-árunum
Mynd: Dánjal Poulsen/Vága Samferðslusøga

Eftir kríggið var beinanvegin áhugi fyri at skipa regluliga flogferðslu millum Føroyar og onnur lond, og í 1946 varð P/F Føroya Flogfelag sett á stovn. Felagið leigaði eitt skotskt DC-3 flogfar, sum skuldi flúgva millum Føroyar og Keypmannahavn um Prestwick í Skotlandi. Flúgvingin byrjaði í juli, men endaði longu í oktober sama ár, tí hon bar seg ikki.

Í desember 1949 keypti felagið við stuðli frá landinum eitt nýtt flogfar, men tað brotnaði bert tríggjar dagar eftir, at tað var komið til landið.

Samstarv við íslendingar

Eftir at bretar vóru farnir av landinum, lá flogvøllurin meir ella minni í órøkt. Men í 1963 eydnaðist tað føroyingum at fáa eitt samstarv í lag við Flugfélag Íslands um regluliga flúgving. Samstarvið endaði í 2003.

Krøvini frá donsku loftferðslumyndugleikunum í 1963 gjørdu, at neyðugt var við stórum ábøtum á asfaltið á flogvøllinum. Samstundis vórðu eini avgreiðsluhús bygd við einum lítlum torni, bíðirúmi og kafeteria, og hús til sløkkiliðið og tøkniligan útbúnað vórðu bygd. Telefon-, telex- og ellinjur vórðu eisini lagdar.

Árini 1978-80 varð vøllurin longdur úr 1100 upp í 1250 metrar, lendið kring vøllin varð slættað, og eitt trygdarøki við tjúkkum skervlagi varð gjørt í báðum endum av vøllinum. Tá vórðu nýggjar ljósmastrar eisini settar upp uttan fyri báðar endarnar.

Flogvøllurin í Vágum síðst í 1960-árunum. Myndin er tikin úr Alouette III tyrluni hjá donsku sjóverjuni
Mynd: Jens Mikkelsen/Vága Samferðslusøga

Í 1988, sama árið sum Atlantic Airways byrjaði sína flúgving, varð ein nýggj og útbygd farstøð latin upp við flogvøllin, men síðani hendi ikki meir fyrr enn í 2007, tá Føroyar yvirtóku flogvøllin frá donsku loftferðslumyndugleikunum, og avgjørt varð at leingja flogvøllin upp í 1799 metrar og gera eina nýggja fullfíggjaða ILS-innflúgvingarskipan, so lendast kann í so at siga øllum veðri. Tað arbeiðið var liðugt í 2011, og í 2014 varð nýggj og góð farstøð eisini tikin í nýtslu.



Gebr. Heinemann
Gegründet 1879

Serving a traveller's world of shopping.

Gebr. Heinemann SE & Co. KG | Koreastrasse 3 | 20457 Hamburg
Phone +49 (40) 30 10 20 | www.gebr-heinemann.de